## Nú ella ongantíð

*Orð: Hjalmar Hansen*

*Sverri Steinhólm, formaður í Bláa Krossi Føroya, sigur, at tíðin er tann rætta at gera byggiætlanina til veruleika. Hann sigur, at verður tað ikki nú, so roknar hann við, at tað verður seinur dagur, at Blái Krossur byggir nýtt.*

**Byrja um 1 ár**
Sum kunnugt hevur í fleiri ár verið arbeitt við ætlanini at byggja ein bygning ið kann hýsa rúsviðgerð. Grundøkið er fingið til vega á Nesi, á einum staðið, ið verður nevnt "við Pætursshús". Vónandi kann verða farið undir at byggja um eitt ár ella so, sigur Sverri. Fyri at hetta skal kunna gerast veruleiki, er neyðugt, at fíggingin av byggingini er komin upp á pláss til ta tíð. Hetta komandi árið verður serligur dentur lagdur á at arbeiða við at fíggjarspurninginum. Í blaðnum hesaferð er ein áheitan á fólk um at seta seg fyri eina fasta upphædd í 24 mánaðir, men eisini verður roynt at fáa írestandi fígging til vega á annan hátt.

**Fíggingarnevnd**
Ein serliga fíggingarnevnd er sett til at arbeiða við fíggjarspurninginum. Í henni eru: Álvur Højgaard, Jaspur Langgaard, Hjalmar Hansen og Óli Breckmann. Hendan nevndin skal ætlandi arbeiða fram til komandi summarferiu, og eigur tá at vera greitt, um neyðuga fíggingin er fingin upp á pláss ella ikki.

**Broyting í MVG lógini**
Ein týdningarmikil partur av fíggingini er MVG-endurgjald. Samlaða MVG-ið av byggiætlanini er uml. 2 mió kr. Løgtingið gjørdi eina broyting í MVG lógini í vár, soleiðis at gjørligt er hjá eitt nú felagsskapum at fáa MVG-ið av byggiverkætlanum endurgoldið. Men hendan lógarbroyting er tíðaravmarkað, og tí skal arbeiðast, meðan hon er galdandi.

**Eisini neyðugt at lána**
Sverri Steinhólm sigur, at neyðugt verður uttan iva við lántøku, men hann vónar, at hon kann gerast so lítil sum til ber. Tess minni lán, tess lættari verður raksturin og meir peningur til onnur hjálpar- og fyribyrgjandi tiltøk hjá Bláa Krossi. Tí heitir hann staðiliga á blákrosslimir og annars øll, ið ynskja, at rúsviðgerðin skal fáa betur umstøður, um at taka undir við áheitanini um at stuðla við eini fastari mánaðarligari upphædd í 24 mánaðir.